Tiltøk

Ebenezer
Fríggjadagin kl. 20 ungdómsmøti.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Morgunmøti kl. 11, kl. 18 evangeliskt møti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 06 morgunbøn, kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 06 morgunbøn, kl. 17 landsbøn.
Sunnudagin kl. 06 morgunbøn, kl. 11 morgungudstænasta, kl. 18 møti, Edna og Arne Kallevik tala og syngja, kl. 22 útimøti (um viðrar).

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Sylverius Jacobsen.

Frelsunarherurin Tórshavn
Leygardagin kl. 11 útimøti.
Sunnudagin kl. 11 møti, major Inger Sofie Tjåland talar, kl. 18 møti við Palla Petersen.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti við Sunnivu og Hans Jacob. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli. Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 06. Øll eru vælkomin.

Karmel, Eiði
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli og møti kl. 19 við Hans Johannesen (Hassi) og Katrin Hansen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Møti verður sunnudagin kl. 19, Alfred Olsen talar yvir evnið »Hin kristna vónin«. Øll eru vælkomin.

Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 19 í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará við Gulak Hansen, Tjørnuvík o.ø.
Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Irenu Bech, Skipanes.
Hósdagin kl. 20 bønarmøti.
Morgunbøn er mánamorgun, mikumorgun og fríggjamorgun frá kl. 6-7.

Keldan, Skálafirði
Mikudagin kl. 20 evangeliseringsseminar og bøn. Leygardagin opið hús kl. 21.
Sunnudagin kl. 19 møti við Jan Jacobsen og Osbjørn Joensen.
http://www.keldan.fo

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 seinasti sunnudagsskúlin áðrenn summarfrítíðina, kl. 18.30 lovsangur, kl. 19 møti, innsavnan til húsið, felagskórið syngur.
Mikudagin kl. 20 bíbliutími.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti-pizzakvøld verður í kvøld kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Kára og Helenu.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

Samkoman, Sion Vági
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er hvønn mánadag kl. 10.00-18.00 og týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 19. juni
kl. 10-12 Ítriv
kl. 14-18 Hugnaløta við nál og práti
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin.
Týsdagin 20. juni
kl. 10-12: Vit baka
kl. 15: Frásagnir, søgur, prát og annað
Mikudagin 21. juni
kl. 10: Fyrireiking til døgurðan
kl. 12: Døgurði
kl. 15: Túrur
Hósdagin 22. juni
kl. 10-17: Opið hús
Fríggjadagin 23. juni
kl. 10-15: Opið hús
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

1000-ára haldið
Í sambandi við Jóan-søkuna verður framsýningin hjá J. P. Gregoriussen, arkitekti um kirkurnar í Føroyum í skúlanum í Vági frá 23.-30. juni.

Felagið Tórshavn náttartúrur
Leygarkvøldið 24. juni verður náttartúrurin: Koppenni-Vatnsdalur. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 19. Havið matpakka og góð, heit gonguklæði við, túrurin er langur. Tilm. á Kunningarstovuni.

Vága Gongufelag
Um viðrar verður farið á Árnafjall, sunnudagin 25.06. kl. 09. Byrja verður av Oyrargjógv við bát og siglt verður til Tjørnunes, haðani verður gingið niðan á Árnafjall. Viðrar ikki eftir sjónum, verður byrjað frá endanum av vegnum í Bø.
Havið matpakka og góð gonguklæðir við. Um siglt verður, kostar túruin. Prísur fæst at vita við tilmelding. Tilm. er neyðug. Tlf. 333455, 213455 ella 333200.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur kl. 20-21 og 22.30-23.30.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla (gamla læraraíbúðin).

Blái Krossur
bjóðar til eftirviðgerð hvørt **mánakvøld** á skrivstovuni hjá Bláa Krossi **á Glyvrum,** kl. 20–21.30. Nærri fæst at vita á tlf. 315575.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 19.00 til 21.00. Tlf. 212380.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
Fyrsta leygardag hvønn mánað: Altjóða nátturði «Potluck» kl. 18.30.
Opið hvørt fríggjakvøld: Samkoma kl. 20.
Bahá'í-samfelagið í Tórshavn

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Føroya Astma/ Allergifelag
Postadressa MBF-húsið, Íslandsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

Giktafelag Føroya
tlf. 44 48 03 fax 44 51 04
e-mail: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan í MBF húsinum hevur opið mánadag frá 14.00 til 16.00, tlf. 310237 ella støkk inn á Íslandsvegi 10 C, Tórshavn.
Foreldrabólkurin at giktsjúkum børnum, Betty og Noel Joensen, Klaksvík, tlf. 45 73 37 eftir arbeiðstíð.
Ungdómsbólkurin: Sára Tummassardóttir, tlf. 37 31 06 eftir skúlatíð, ella e-mail: sara@post.olivant.fo

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Javni
Skrivstovan verður **stongd vegna summarfrí** frá 15. juni. Ringjast kann til Dianu í Puntabyrgi tlf. 216510 ella Onnu Elisabeth Victorsdóttir, aftaná arbeiðstíð tlf. 315960.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

MBF
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Sosialráðgevin er at hitta hvønn mánadag millum kl. 10.30-12. Ring og avtala tíð á tlf. 31 73 73.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

Føroysk gudstænasta í Reykjavík
Sunnudagin 25. kl. 14 verður føroysk gudstænasta í Háteigiskirkju í Reykjavík, Martin Restorff Jacobsen, prestur í Hvalvík talar.

Nærvarpið LUMI radio í Aalborg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10.00.

Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroysk møti
Føroysk møti eru triðja leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyska arbeiðið Í Eliaskirkjuni
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

Føroyingarfelagið í Aalborg
Lille Kongens Gade 10 B.
Tel. 98136330
Húsið er opið soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00

Kristnastova
Birmavej 36, København S, tlf. 32 55 18 09
fax. 32 58 61 49
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20.
Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

Malta, Hirtshals
Sunnudag:
Kl. 11: Breyðbróting.
Kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.
Samkoman Malta í Hirtshals

Føroyingar í Noregi
E-mail:
foroyar@norden.no
Heimasíða:
http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Óslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Heimamissiónin
Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/ 26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

Ráðgevingin fyri Føroyingar í Danmark
Vegna summarfrí er Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark stongd frá 19. juni til og við 9. juli.
Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark,
Vesterbrogade 17 A,
1620 Kbh. V.

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

Føroyingafelagið í Árhus
Vestergade 48 D
8000 Århus C
Telefon og fax: 86180604
Teldupostur:
aarstova@teliamail.dk
Heimasíðan:
http://welcome.to/aarstova
Aarstova er opin soleiðis:
Café Mánad.-hósd.: kl. 16-18
Føroysku bløðini liggja frammi.
Fríggjakvøldsbarr: kl. 21-03
Limir ókeypis atgongd. Onnur kr. 10,-.
Onnur reglulig tiltøk í Aarstovu:
MFS. Meginfelag Føroyska Studenta hevur opið hvønn mikudag kl. 16-18.
Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag kl. 11-14 (ólíka vikur).
Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag kl. 14.30 (líka vikur).
Bókasavn. Føroyskar bøkur kunnu lánast mánadag-hósdag kl. 16-18.
Ítróttartiltøk:
Flogboltur. Frydenlundskúlin fríggjadag kl. 16-18. Bussur nr. 4.
Svimjing. Frydenlundskúlin fríggjakvøld kl. 18-19. Bussur nr. 4.
Fótboltur. Hasselager Hallen fríggjakvøld kl. 21-23. Bussur nr. 15.

Prógv

Gunnvá Staksberg, Tórshavn hevur lokið yrkisútbúgving innan skrivstovuyrki (fyrisiting). Læruplass: Guttesen & Staksberg, Tórshavn.

Ólavur Paulason Nielsen, Tórshavn, hevur lokið yrkisútbúgving sum bilmekanikari. Læruplass: Reyni Service, Hoyvík.

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17 A
1620 København V
Tlf. 33 23 15 87
Fax 33 23 15 18
Kunningartlf. 33 23 15 86, sum sigur frá øllum tiltøkum.
Heimasíða:
www.faroehouse.dk
E-mail:
postur@faroehouse.dk
Upplatingartíðir:
mánadag–fríggjadag:
kl. 16.00–19.00.
24. juni
Jóansøkudansur, Revival spælir.
4.-22. juli
Kaffistovan er stongd í 3 vikur.

Føroyingafelagið í Reykjavík
Øldulsíð 27
220 Hafnafjørður, Ísland
Tlf. 565 4883
E-mail: forrek@visir.is

TIPS 12 úrslit
Vika 24
17.–21. juni

1. Rumænien–Portugal	2
2. England–Tyskland	1
3. Slovenien–Spanien	2
4. Norge–Jugoslavien	2
5. Italien–Sverige	1
6. Tyrkiet–Belgien	1
7. England–Rumænien	2
8. Portugal–Tyskland	1
9. Jugoslavien–Spanien	2
10. Slovenien–Norge	X
11. Danmark–Tjekkiet	2
12. Frankrig–Holland	2

Prognosa

12 rætt:	89.040,- kr.
11 rætt:	1.858,- kr.
10 rætt:	226,- kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

Vika 24 - 21. juni

Vinnaratøl: **02 - 06 - 22 - 26 - 37 - 48**
Eykatøl: **27 - 33**

6 vinnaratøl:	3.101.125,- kr.
5 vinnarat.+1 eykat.:	62.437,- kr.
5 vinnaratøl:	3.825,- kr.
4 vinnaratøl:	118,- kr.
3 vinnaratøl:	31,- kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

VALUTAKURSIR

		22.06.00	Ultimo mai
USA	**Dollarar**	791,2900	800,0200
Bretland	**Pund**	1190,0900	1197,6600
Týskland	**Markur**	381,2800	381,5600
Svoríki	**Króna**	90,3100	89,1600
Noreg	**Króna**	90,8700	89,6700
Frakland	**Frankur**	113,6800	113,7700
Belgia	**Frankur**	18,4860	18,1990
Sveits	**Frankur**	481,5100	474,9300
Holland	**Gyllin**	338,3900	338,6400
Italia	**Líri**	0,3851	0,3854
Finnland	**Markur**	125,4200	125,5100
Ísland	**Króna**	10,2800	10,5400
Eysturríki	**Skillingur**	54,1930	54,2230
Spania	**Pesetas**	4,4820	4,4850
Portugal	**Escudos**	3,7200	3,7220
Kanada	**Dollari**	536,7500	532,0900
Grikkaland	**Drakmur**	2,2160	2,2160
Japan	**Yen**	7,5180	7,4522
Írland	**Pund**	946,8600	947,4200
	Evra	745,7100	746,2600

FØROYA SPARIKASSI

HAVNAR BIO

Shanghai Noon

Filmurin snýr seg um, at undurfagra prinsessan Pei Pei (Lucy Liu) í farni øld verður burturførd ffrá heimi sínum í forbodnað býnum åi Kina. Keisarin sendur 3 av sterkastu og djarvastu monnum sínum avstað við loysigjaldinum í gulli til burturflytararnar í Vild West í Amerika.
Chon Wang (Jackie Chang) telist ikki millum teir heiðuligu útvaldu!
Tó eydnast honum at koma við gubba sínum sum kuffertberari. Hesin er tolkur hjá teimum trimum djørvu monnunum hjá keisarunum.
Ávegis í larmandi toki í Nevadaoyðimørkini, har turkur og hiti eru ræðulig, verður fylgið keisarans álopið og burturført av fátøkum ránarum, kendir sum Roy O'Bannon harkaliði.
Leiðarin hjá hesum nýtir tó meira tíð uppá sjálvan seg, enn uppá at ansa sínum uppgávum. Nakrar av hesum eru sjálvsagt at stjala frá ferðafólkunum.
Á undurverdan hátt eydnast Chon at fáa aftur frá ránarunum, tað teir hava tikið. Men tað eydnast honum eisini at sita eina eftir í oyðimørkini, meðan tokið tøffar víðari.



Frumsýning
Fríggjadagin 23.06. kl. 21[15] Fríggjadagin 23.06. kl. 23[30]
Leygardagin 24.06. kl. 21[15] Leygardagin 24.06. kl. 23[30]
Sunnudagin 25.06. kl. 20[00] Sunnudagin 25.06. kl. 22[30]

HAVNAR BIO
✶ Tlf. 311956 ✶



Fríggjadagin 23.06. kl. 20[30] Fríggjadagin 23.06. kl. 23[00]
Leygardagin 24.06. kl. 20[30] Leygardagin 24.06. kl. 23[00]
Sunnudagin 25.06. kl. 22[00]

Fríggjadagin 23.06. kl. 18[45] Leygardagin 24.06. kl. 18[45]
Sunnudagin 25.06. kl. 19[30]

KOMANDI FILMUR

Frumsýning Fríggjadagin 30.06.

Sí eisini SvF tekstvarp s. 611–613

★ BIO KIOSKIN ★
Heitt Pop–Corn – Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís o.m.a